# 120 arbeiðspláss kunnu hvørva í mai

**Alivinnan í Norðoyggjum stendur á einum vegamóti. Steðgar hon heilt upp, verður einki arbeiðið til 120 fólk í hesi vinnuni aftaná mai í ár. Men ein lítil glotti sæst kortini í havsbrúnni, nú íslendingar eru farnir av vísa Norðoyggjum sína áhuga**



*Alingin í Norðoyggjum hevur tað ikki ov lætt í løtuni. Onkur glotti er tó at hóma, nú íslendingar hava víst hesum aliøkinum áhuga*

*Savnsmynd*

ALING
*Snorri Brend*

**Norðoyggjar:** Í løtuni eru umleið 60 arbeiðspláss á Kryvjing, ímeðan nakað tað sama av arbeiðsplássum eru á Faroe Salmon og Eystlaks. Afturat hesum eru helst ikki so fá arbeiðispláss í vinnum, sum hava tilknýtið til alivinnuna.

Men Norðlýsið hevur fingið váttað tíðindi um, at Faroe Salmon hevur keypt rogn úr Skotlandi. Hesi komu á smoltstøðina í Knússdali fyri tveimum vikum síðan, og verða rognini klakt í komandi mánaði.

Samstundis hevur Faroe Salmon gjørt eitt upplegg til ein fíggingarstovn um virksemi í framtíðini. Her er talan um pening at seta hesi smoltini út. Verður hendan ætlanin veruleiki, verður roknað við, at Kryvjing ikki kemur at liggja stilt í meira enn eitt ár.

Sum støðan er beint nú, verður allur tann tilkomni fiskurin liðugt kruvdur í mai mánað, og tá steðgar kryvjingin av sær sjálvum.

## Aling á Hvannasundi

Tað er ikki óhugsandi, at íslendingar fara at ala á Hvannasundi.

Íslendiskir íleggjarar eru nevniliga farnir at vísa Faroe Salmon áhuga. Norðlýsið hevur fingið upp-spurt, at ein áheitan er komin frá íslendingum um at fáa ein fjørð í Norðoyggjum at at ala á.

Faroe Salmon hevur bjóðað íslendingum norðara part av Hvannasundi til aling, men endalig semja er ikki gjørd millum partarnar. Roknað verður kortini við at íslendingar fara at gera eina roynd.

Í Íslandi hava teir havt stórar trupulleikar við alingini. Hetta kemst fyri stóran part av, at sjógvurin har er nógv kaldari enn hjá okkum.

# Kristilig fótbóltskapping á Eiði

Ungdómstiltak: leygardagin 2. apríl verður ítróttarhøllin á Eiði karmur um eina »kristiliga« fótbóltskapping, sum bæði er ætlað dreingjum og gentum.

Kappingin byrjar fyrrapartin og verður hildið á til út á seinnapartin, tá vinnararnir verða funnir í dreingjakappingini og í gentukappingini. Eins og vanligt er fáa trý tey fremstu liðini heiðursmerki.

Á skránni fyri dagin verður kortini ikki bert fótbóltur, hóast hann fer at fylla mest í tiltakinum. Har verður andakt eins og ein undir kappingini hevur møguleika at fara til áhugatímar við fleiri spennandi evnum.

Serligar reglur verða gjørdar fyri kappingina, m.a. hava mannfólkini í mesta lagi loyvi at hava ein spælara úr 1. deild ella tveir úr 2. deild. Aldursmarkið hjá dreingjunum er 15 ár, meðan tað er 13 ár hjá gentunum. Tað er ókeypis at hyggja eftir dystunum.

**sb.**

# Fólkatalið øktist hóast vánalig útlit

***Hvalba:*** Hesar seinastu mánaðirnar hevur flakavirkið í Hvalba fingið dúgliga umrøðu í fjølmiðlunum eftir at tað varð latið aftur herfyri.

Hvørja ávirkan hetta fer at fáa á fólkatalið í framtíðini er ilt at meta. Eitt yvirlit um manntalið í føroysku kommununum vísir kortini, at fólkatalið í Hvalba og í Sandvík er økt hetta seinasta árið. Enn hava tey vánaligu útlitini ikki havt stórvegis ávirkan á bygdina.

Við ársbyrjan í fjør búðu 769 fólk í báðum bygdunum, sum hoyra til Hvalbiar kommunu, og tá árið var at enda komið var fólkatalið økt við fimm upp í 774 fólk.

Gjøgnum alt 2004 eru íalt 11 fólk flutt í og níggju fólk úr kommununi í onnur lond. Samstundis eru 26 fólk flutt hagar úr øðrumj føroyskum kommunum, og 20 úr Hvalba til onnur støð í Føroyum.

Níggju nýggir hvalbingar sóu dagsins ljós, meðan seks andaðust í fjør. Samanlagt gevur hetta so ein vøkstur til fólkatalið, sum tað var við ársskiftið, nevniliga 774 fólk.

**sb.**



Stuðul og tryggleiki til ferðina gjøgnum lívið

Í Føroya Banka hevur tú góðar møguleikar at tryggja teg og familju tína. Her fært tú alt á einum stað - fíggjarráðgeving og tryggleika.

Saman kunnu Føroya Banki og Trygd bjóða allar hóskandi tryggingar til ferðina gjøgnum lívið: Familjutrygging, Sethúsatrygging, Biltrygging, Lán við trygging og Samlagstrygging.

Kom inn í eina av deildunum hjá Føroya Banka ella til Trygd og fá eina trygging, sum hóskar til tín tørv.

TRYGD FØROYA BANKI

petur & petur • 320870